www.visitbillund.dk

Billund ErhvervsFremme - turistinformation på 79 72 72 02



Overnatning · Aktiviteter · Byer · Seværdigheder

Übernachtung · Aktivitäten · Städte · Sehenswürdigkeiten · Transport

Overnight accomadation · Activities · Towns · Places worth seeing · Transport



4

# Fjøltáttaða landslagið í Skallerup



## Skallerup Klit liggur í einari náttúru, sum kann bjóða ymiskar upplivingar alt árið

Í einum væl kendum parti í Norðurjútlandi, nakað sunnan fyri Hirtshals, har nógvir føroyingar búleikast, liggur Skallerup Klit og Skallerup Feriecenter. Økið bjóðar upp á nógvar náttúruupplivingar. Á einum øki, sum millum manna verður nevnd »Strandarlinjan frá steinøldini«, ber til at ganga ein langan túr á einum øki, sum er umfatað av náttúrufriðing. Á túrinum ber til at uppliva nógvan sjáldsaman plantuvøkstur. Sunnan fyri Lønstrup liggur vitin á Rubjerg Knude, sum næstan er fjaldur í sandinum.

### Landbúnaðarvørur

Á hesum økinum ber eisini til at fáa frískar landbúnaðarvørur frá Skallerup Klit bóndagarðinum og í Klithusegården, har framleiðsla av kjøti, frukt, grønmeti, egg og mjólk er í gongd. Í smáum sølubúðum framvið landavegunum ber til at keypa fríspt grønmeti, og einki kann væl samanberast við nýggj eplir, og nýggjar gularøtur. Nógv ber vaksa eisini í lendinum, sum tað ber til hjá fólki at fáa til matna. Til ber eisini at fara út at fiska, ella at leiga ein hest, og njóta ein túr á rossabaki framvið strondini.

### Baða alt árið

Ígjøgnum fleiri ættarlið hevur Skallerup Klit verið eitt tað best umtókta ferðamálið. Ein góðan danskan summardag, er ringt at finna eina strond, sum er betri.

Men eisini í Skallerup hava tey lært, at tað er neyðugt hjá fólki eisini at fáa eina upplivíng, tá veðrið ikki er til vildar. Eitt tropiskt vatnland, »Atlantis«, er á frítíðarmiðdeplinum á Skallerup Strand. Í Athen liggur hitin í vatninum um tey 28 hitastigini. Í Atlantis liggja hitastigini fast um tey 31 hitastigini. Í baðilandinum eru helli, fossar, steinfigurar. Eisini er ein skreiðibreyt, sum er heilar 83 metrar long.

Ein aktivitetur, sum børnini og tey ungu eisini fáast nógv við um summarið, er at byggja sandborgir.

Fyri summi er tað eisini av týdningi at taka sær av løttum, og ikki leika ov nógv í. Á frítíðarmiðdeplinum ber eisini til at taka sær av løttum í termalbaðistaðnum, sum nevnist »Romelus«. Í Romelus kann ein fáa eina góða kropsviðgerð við heitum steinum, og væl angandi olju.

### Golf og djóralív

Ein ítróttargrein, sum ongantíð hevur havt tey bestu korini í Føroyum, er golf. Á golfvøllinum í Vennebjerg ber til at royna seg í serstøku ítróttargreinini, hvat antin tað er á byrjunnarstøði, ella talan er um ein meiri royndan íðkara. Við síðuna av baðilandinum »Atlantis« er ein svimjihylur, sum er gjørdur eftir vanligu forskriftunum.

Á bóndagarðinum »Klithusegården« kann ein síggja, hvussu landbúnaðarin varð rikin í Danmark fyri 50 árum síðani. Á garðinum eru grísar, hestar, geitir, kaninir, høsn og dádýr. Børn, sum vitja bóndagarðin, sleppa at uppliva veruliga og sanna bóndalívið.

Upplivingarnar eru mangar og fjøltáttaðar á Skallerup Klit, og á økinum har um leiðir.

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

